betri pensjón

# Tilskilan

*Sí vegleiðing til tilskilanarblaðið á síðu 3*

**Upplýsingar um teg**

| | | |
|---|---|---|
| Navn | P-tal | |
| Bústaður | Postnummar | Bygd/býur |
| Teldupostur | Telefonnummar | |

## Lívstryggingar

Eg vil, at allar mínar lívstryggingar skulu útgjaldast til (set bert ein kross):

☐ 1) Næsta avvarðandi

☐ 2) Míni børn í líka stórum lutum

☐ 3) Búgvið

☐ 4) Ein ella fleiri navngivnir persónar (útfyll niðanfyri)

**Navngivnir persónar (skal bert útfyllast um tú hevur sett kross við punkt 4.)**

| | | |
|---|---|---|
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |

*Fevnir tilskilanarblaðið um Krosslívstrygging, skal hetta viðmerkjast á síðu 2.*

## Pensjónin

Pensjónin verður goldin mær, um eg eri á lívi, tá ið útgjaldast skal. Doyggi eg áðrenn øll mín pensjón er útgoldin, skal pensjónin útgjaldast til (set bert ein kross):

☐ 1) Næsta avvarðandi

☐ 2) Míni børn í líka stórum lutum

☐ 3) Búgvið

☐ 4) Ein ella fleiri navngivnir persónar (útfyll á næstu síðu)

## Navngivnir persónar (skal bert útfyllast um tú hevur sett kross við punkt 4.)

| | | |
|---|---|---|
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |
| Navn á tilskilaða | P-tal | Upphædd ella %-partur |

## Tilskilan galdandi fyri ávísa trygging ella fyri Krosslívstrygging

Umfatar hetta tilskilanarblaðið einans ávísar tryggingar ella pensjónir, skulu umfataðu tryggingarnummurini upplýsast niðanfyri.
Umfatar hetta tilskilanarblaðið Krosslívstryggingar, har tú ert tryggingartakari, skal tryggingarnummarið upplýsast niðanfyri. Er einki tryggingarnummar upplýst, er tilskilanin ikki galdandi fyri møguligar Krosslívstryggingar.

Dagfesting

Undirskrift

*Sí vegleiðing til tilskilanarblaðið á næstu síðu.*

betri pensjón

# Vegleiðing til tilskilanarblaðið

Er eingin skrivlig avtala gjørd við Betri Pensjón um annað, verða lívstryggingar- og pensjónsupphæddirnar í sambandi við deyða goldnar út til *næsta avvarðandi*. Næsti avvarðandi er hjúnafelagin. Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til lívsarvingar. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært testamenti. Er einki testamenti, verður útgoldið sambært arvalógini.

## Hvat merkir tilskilan?

Tá ið tú tilskilar onkran persón á tínari lívstrygging ella pensjón, gert tú av, hvør skal hava tína tryggingarupphædd ella pensjón, um tú doyrt. Legg til merkis, at velur tú at tilskila onnur enn næsta avvarðandi, kunnu tvingsilsarvingar mótmæla hesi tilskilan rættarliga.

## Lívstrygging

Tú kanst tilskila tínar lívstryggingar eftir egnum ynski. Er eingin tilskilaður, verður útgoldið til næsta avvarðandi.

## Pensjón

Tú kanst tilskila tínar pensjónir eftir egnum ynski. Er eingin tilskilaður verður útgoldið til næsta avvarðandi.

## Krosslívstrygging

Krosslívstrygging verður vanliga ikki tilskilað, tí fyrimunurin við hesari trygging í mun til vanliga lívstrygging er, at tann sum eigur tryggingina (tryggingartakari) fær útgjaldið frá tryggingini, um tann sum er tryggjaður (tryggjaði) doyr. Arvingar kunnu ikki mótmæla útgjaldinum og einki arvaavgjald skal rindast.
Velur man at tilskila hesa trygging, kann útgjaldið mótmælast av tvingilsarvingum umframt, at arvaavgjald skal rindast av útgjaldinum.

## Hvørji eru tvingsilsarvingar?

Tvingsilsarvingar eru hjúnafelagi og lívsarvingar.

## Hvørji eru lívsarvingar?

Lívsarvingar eru egin og ættleidd børn, barnabørn og tey, sum hvør í sínum lagi eru í ættarliðunum aftanfyri.

## Ognarvernd

Tá ið ein trygging ella pensjónssamansparing verður útgoldin til næsta avvarðandi ella onnur tilskilaði í sambandi við deyða, verður upphæddin útgoldin uttan um búgvið.
Við hesum er útgjaldið vart mótvegis ognarum, ið eru tey, sum hava fíggjarlig krøv mótvegis tí deyða.

## Útgjald til búgvið

Hevur tú valt at útgjøld í sambandi við tín deyða skulu falla til búgvið, verða hesi ein partur av ognini javnbjóðis aðrari ogn í búnum. Henda ogn verður býtt eftir arvalógini ella einum møguligum testamenti. Tá fellur ognarverndin burtur.

## Arvaavgjald

Við deyða skulu arvingar rinda arvaavgjald av upphædd, ið verður útgoldin.
Arvaavgjaldsskipanin er samansett av fýra bólkum. Avgjaldið verður ásett eftir, hvussu nær arvingur er skyldur við ognaran. Yvirlitið niðanfyri vísir, hvussu nógv verður rindað í arvaavgjaldi.

| | |
|---|---|
| Hjúnafelagi, børn og adoptivbørn | 3 % |
| Foreldur, systkin og børn hjá hesum | 6 % |
| Ommur, abbar og eftirkomarar hjá hesum | 9 % |
| Onnur, ið ikki koma undir bólk 1, 2 ella 3 | 12 % |

Hetta er galdandi fyri arv á kr. 100.000 ella meira. Er arvurin minni, lækkar avgjaldið stigvíst, eftir hvussu stórur arvurin er, úr 0,25 % til 2 % lægri. Nevndu lækkingar eru galdandi fyri allar fýra bólkarnar.

Arvur, ið verður útgoldin til feløg o.tíl., rindar fast 10 % í arvaavgjaldi.

Nevndu upplýsingar eru vegleiðandi úr Lov om arveafgift, ið er galdandi fyri Føroyar. Neyvari ásetingar fáast við at seta seg í samband við Skiftirættin, ið umsitur arvaavgjøld.